# Roknaðu við vatnskaðum

*Teir hava økt vatntrýstið við at taka reinsiverkið frá og tilkoplað vatnbrunnin í Havnardali. – Tað sum frammanundan er veikt, tað fer í slíkum føri, sigur vatnmeistarin*

Dia Midjord

Tað kemur ikki óvart á vatnmeistaran, at vatnskaðar hava verið fleiri staðni í høvuðsstaðnum seinastu dagarnar.

– Vit noyddust at hækka vatntrýstið og vit vistu, at hetta kundi elva til vatnskaðar, sigur Janus Sørensen, vatnmeistari.

### Vatn í jólagávu

Vatnverkið hevur nevniliga vaksið um trýstið við einum góðum kilo, fyri at øll skulu hava eitt nøkulunda vatntrýst. Orsøkin er, at brunnurin í Villingardali er nærum tómur, og størsti parturin av Tórshavnar kommunu fær nú vatn úr Havnardali.

– Vatnstandurin er vaksin ein góðan hálvan metur í Havnardali, men í Villingardali er sama skil. Hesin verður neyvan fyltur fyrr enn til jóla, sigur vatnmeistarin.

### Einasta loysn

Brunnurin í Havnardali liggur á 163 metra hædd, og hevur eitt trýst á sekstan kilo. Men vanliga fer vatnið úr byrgingini umvegis reinsiverkið, sum liggur einar tólv metrar lægri. Ymsa staðni á vegnum oman eru eisini trýsttemjarar.



*Vatnstandurin í vatngoymsluni í Villingardali er einki vaksin, og brunnurin verður neyvan fullur fyrr enn á jólum*

– Hesir syrgja fyri, at trýstið er á leið eini trý kilo til eitt vanligt húsarhald, sigur vatnmeistarin.

Men nú er reinsiverkið frákoplað, og vatnið verður latið beinleiðis úr byrgingini. Hetta hevur so ført við sær eitt hægri trýst.

– Skuldu vit veita øllum húsarhaldum eitt nøkulunda trýst, so noyddust vit gera á henda hátt. Og vit vistu, at hetta kanska fór at elva til nakrar trupulleikar, sigur Janus Sørensen, vatnmeistari.

# Per á Hædd slapp við skrekkinum

*Fleiri kuffert við lampum og aðrari tekniskari útgerð stóðu í rúminum, har vatn brádliga fossaði inn. Men alt var væl pakkað niður*

Dia Midjord

Hósdagin í farnu viku kundi endað heilt galið í tekniska atelierinum hjá Per á Hædd. Vatnrørið í innføringini til eitt brandskáp brast brádliga í døgurðatímanum, og hálvanannan tíma fossaði vatn út .

– Kanska virði fyri einar 50 til 100 túsund krónur eru mist, men tað kundi verið fleiri ferðir verri, sigur Per á Hædd. Hann sipar til, at eini tíggju kuffert við lampum og aðrari tekniskai útgerð stóðu inni í atelierinum.

– Kuffertini vóru tíbetur aftur, og útgerðin var væl pakkað niður. Var hon ikki tað, kundi ein hálv millión lættiliga farið fyri skeytið, sigur yrkisfotografurin, sum eisini fegnast yvir, at útgerðin var fingin út í tøkum tíma.




### Turrar brúðarmyndir

Einki vatn kom í tað fína atelierið, har eitt nú brúðarmyndir verða tiknar. Men ríkiligt av dramatikki var í hinum atelierinum.

– Vit funnu ikki stoppikranan beinanvegin. Tá vit funnu henda uttanfyri, passaði lykilin ikki til, so tú kanst fyristilla tær alt rokið, sigur Per á Hædd.

Seinnapartin í gjár kundi fotografurin aftur brúka tekniska atelierið, sum hevur ligið brakk nakrar dagar, meðan fleiri avfuktarar hava koyrt í døgndrift.

## Signar bíðar eftir flokkinum

*Fundurin í Tjóðveldisflokkinum, sum skal geva frákoyrda landsstýrismanninum og øðrum svar upp á fleiri ivaspurningar, hevur ikki verið*



Tjóðveldisflokkurin hevur enn ikki havt fundin, har málið um Signar á Brúnni skal viðgerast. Og høvuðspersónurin gongur tí og bíðar í spenningi, um hann kanska tá fær svar upp á onkran av teimum ósvaraðu spurningunum.

– Kanningin er nú liðug og eitt úrslit fyriliggur. Tað er hetta evnið, ið hevur mín serliga áhuga á komandi fundi í Tjóðveldisflokkinum, sigur landsstýrismaðurin, ið mátti víkja sessin fyri øðrum partamanni.

Signar á Brúnni hevur nógv um at vera og røkir sítt dagliga yrki sum løgtingsmaður. Og hann gongur ikki við hevnd í huganum. Hann vil bert hava svar upp á nakrar ósvaraðar spurningar, men ætlar ikki, at málið síðan skal fáa nakrar fylgjur.

**Dia Midjord**



# Vátt undir fótum á Hotel Tórshavn

*Átta fólk máttu flytast niðan á Hotel Føroyar, tí eitt rør á triðu hædd brast og vatn seyraði niður á Hotel Tórshavn í Havn*

Jústinus Leivsson Eidesgaard

Rættuliga ógvusligt sá tað út um sjeytíðina mánakvøldið uttanfyri gamla sjómansheimið, nú Hotel Tórshavn, tá eyðkendu reyðu bilarnir hjá Tórshavnar Sløkkilið stóðu uttanfyri og døktklæddir brandmenn titaðu út og inn.

Orsøkin til at eitt rør brast á triðju hædd í tí annars ný í standsetta hotellinum er ikki heilt greið enn, men hevur helst samband við at vatnverkið í Havn økti trýstið á rørunum við einum kilo, herfyri, tá teir skiftu høvuðsvatnveitingina úr Villingardali yvir í Havnardal, sum enn er á tremur við vatni. Villingardalur leskar teir, sum búðu á triðju hædd og teir hava verið har síðan.

Samstarvið millum hotellini í Havn er gott í løtuni og teir 60 gestirnir, sum búðu á Hotellinum ótu morgunmat hjá Restorffarunum á Hotel Hafia.

Alla týsnáttina varð arbeitt við at turka Hotel Tórshavn og í dag verður roknað við, at gestir kunnu flyta inn aftur á triðju hædd.

Pizzaria í kjallaranum lat upp aftur í gjár og roknað verður við at restautiónin letir uppaftur í dag.

Nógv fólk hava hjált til at turka Hotel Tórshavn. Tryggingarfelagið, brandstøðin, Leif Mohr og aðrar fyritøkur.

Tað bar ikki til at fáa eina viðmerking frá Jeffra Johannesen, stjóra á Hotel Tórshavn, hann er burturstaddur í løtuni.








bert nakrar fáar býlingar í løtuni.

Og dramatiskt sá tað út, tá heimleysir gestir stóðu uttanfyri hotellið millum brandbilar og forvitin, meðan sólin í vestri litaði og syrgdi fyri ljósleikinum hesa løtuna.

### Bóru skjótt at

Hotellið var smekkfult av gestum, tá óhappið hendi. Men tíbetur, so varnaðust tey lekan næstan beinanvegin og tí gjørdist skaðin ikki so umfatandi. Leiðslan á Hotel Tórshavn er professionell og skjótt varð borið at. Á triðju hædd kundi ongin búgva, har var alt vátt á gólvinum og restauratiónin var eisini ónýtilig, somuleiðis Pizzaria í kjallaranum.

Tað fyrsta sum varð gjørt var at flyta 13 gestir niðan á Hotel Føroyar. Tað vóru

Hotel Tórshavn var stongt í gjár.



*12 gestir vórðu fluttir niðan á Hotel Føroyar, eftir at eitt rør varð brostið á Hotel Tórshavn og vatn hevði skatt tríggjar tær niðastu hæddirnar. Okkara myndamaður var á staðnum og tók hesar myndirnar. Myndin í miðjuni omanfyri hendan tekst er av rørinum, sum brast.*

***Mynd: Jonhard Hammer***